## Fyrsta venjingin hjá Rógva



Nýggja norska felagið hjá Rógva Jacobsen, Hødd, vandi fyri fystu ferð í gjár. Hetta var eisini fyrsta venjingin hjá Rógva í Noreg, og hon gekk væl. Sambært heimasíðuni hjá Hødd vísti Rógva góðar taktir til venjingina. Tað sama gjørdi hin nýggi leikarin, ið eitur Vemund Brekke Skard. Vant var á graslíkisvølli, sum ikki er heilt ókent fyri Rógva. Ferðin var høg og menn vóru svangir eftir at sleppa í gongd, skrivar heimasíðani hjá Hødd.

## Upphiting til landsdystin

Finnur Hansson hevur tikið stig til at skipa fyri upphiting í samband við hondbóltslandsdystin millum Føroyar og Ísrael í annaðkvøld. Finnur fylgdi sjálvur dystinum móti Serbia og fegnaðist um, at so nógvir áskoðarar vóru til staðar. Hann eftirlýsir tó eitt sindur meiri róp, geyl og villskap frá áskoðarunum, og tí skipar hann fyri upphiting kl. 18.00 í Gundadalshøllini. Har kunnu fólk fáa andlitsmáling, og annars bara koma í gott lag áðrenn dysturin byrjar. Finnur Hansson hevur tosað við tey ymsu hondbóltsfeløgini í landinum, sum síðani hava boðað limum sínum frá tiltakinum. Tískil kann roknast við, at fitt av fólki savnast har kl. 18 í í annaðkvøld.

# Dirvi og áræði er vegurin

**Heini Hanusarsson er ein av absoluttu lyklaleikarunum á føroyska landsliðnum, og hann heldur at hetta er rætti pallurin, vit eiga at spæla á**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Heini var sjálvur ikki við í fyrsta dystinum hjá føroyingum móti Serbia, men hann er av teirru áskoðan, at føroysku leikararnar kempaðu sum úlvur á skóg, og stóðu lítið aftanfyri stóru hondbóltstjóðina av Balkan.

- Vit høvdu dirvi og áræði til at spæla okkara kjans, og tóku av, tá høvið var til tess, sigur Heini Hanusarsson, ið er vælnøgdur við at tað royndist føroyska liðnum so væl móti serbisku yvirmaktini.

- Nú hava vit ikki spælt nakran veruligan landsdyst í nærum 10 ár, og tað er sera óheppið. So tað skal vera mín vón, at Hondbólt Samband Føroya (HSF) leggur sær fyri at tað javnan vera altjóða skrásettir dystir á skránni hjá bæði monnum og kvinnum. Hetta er vegurin, heldur enn at senda lið til tílíkar kappingar, sum Challenge Trophy, har vit fáa eittans góðan dyst. Vit hava funnið rætta pallin, sigur Heini.

- Gamaní kann man vænta at fáa ein lúsing við hvørt, tá spælt verður móti mætum hondbóltstjóðum, men halda vit áfram, og vit javnan fáa stórar avbjóðingar, so skal okkurt stigið ivaleyst koma í skjáttuna. Menningin verður munandi størri, og stuttligari verður at spæla hondbólt.

Heini Hanusarsson heldur eisini, at vit eiga at byggja víðari uppá hetta úrslitið, og so metir at hann at ungu kreftirnar á liðnum stóðust serstakliga væl.

- Sjálst um støddin ikki er við okkara ungu leikarum, spældu teir við dirvi og áræði. Teir vóru ikki bangnir fyri at taka avbjóðingarnar á herðarnar og leypa á stóra serbiska múrin.

Heini vónar at HSF fer at halda áfram við landsliðsarbeiðinum, so at vit javnan kunnu síggja slíkir innsatsir frá einum føroyskum hondbóltslandsliði.



*Heini Hanusarsson kempar fyrimyndarliga í verjuni*

# Ein góð og løgin kensla

**Drívmegin handan Kyndla-maskinuna, gjøgnum seinastu mongu árini, og eisini á landsliðnum vísur hann ein øðiligan stríðsvilja. Talan er sjálvsagt um Hans Áka Dahl Christiansen, ið stendur eftur við einari løgnari kenslu. Tí hann kundi hugsað sær meira burturúr dystinum**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

- Eg standi eftir við einari løgnari kenslu. Eg eri sera væl nøgdur við avrikið, móti hesari mætu hondbóltstjóð, men samstundis eitt sindur skuffaður, sigur Hans Áki.



*Hans Áki Dahl Christiansen enn einaferð í hornatøkum á strikuni*

*Hvat gjørdu tit ørðvísi leygardagin?*

- Vit avtalaðu áðrenn dystin, at verjuparturin ikki skuldi liggja eftir, og at allir sum ein skuldu taka tøk í felag. Hetta meti eg, riggaði stak væl og var høvuðsorsøkin til góða úrslitið, vit fingu, sigur Hans Áki, ið følir seg noyddan at siga at um eitt sindur av hepni var við okkara, so var úrslitið kanska eitt annað. Men sum heild er hann væl nøgdur við føroyska avrikið og úrslitið.

*Hvørjar vónir hevur tú til dystin móti Ísrael, mikukvøldið?*

- Vónirnar eru góðar, og megna vit at koma við einum líka góðum innsatsi tá, so skuldi sæð gott út. Men tá tað er sagt, so veit eg ikki serliga nógv um Ísraelska liðið, annað enn at tað neyvan er líka sterkt, og Serbia er, sigur Hans Áki.

- Eg gleði meg til slíkar dystir og vit fara at royna at gera okkara besta, so má man síggja, hvussu langt tað røkkur sigur Hans Áki endaliga.